# Úr grannalondum

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

## Grønlendskir oljumenn

Teir fyrstu seks grønlendingarnir hava nú útvegað sær førleika til at arbeiða á oljupallum úti fyri grønlendsku vesturstrondini. Teir seks hava fingið útbúgving á Ráevnisskúlanum í Sisimiut og trygdarskeið í Aberdeen í Skotlandi. Oljufelagið Cairn Energy, sum leitar eftir olju í Grønlandi, heldur til í Aberdeen.

Teir seks eru teir fyrstu faklærdu grønlendsku oljuarbeiðsmenninir, skrivar grønlendska kringvarpið KNR.

Ta fyrstu tíðina skulu teir seks arbeiða sum tað, sum í oljuvinnuni verður rópt "roustabouts". Hetta eru fólk, ið gera ymiskt fyrifallandi arbeiði á pallinum, men sum eftir eina tíð fáa ávísar uppgávur í sambandi við sjálva boringina.

## Gevast at veiða kóp



Veiðimenn í Labrador og aðrastaðni á kanadisku eysturstrondini hava gjørt av at gevast við at veiða kóp, tí prísurin á kópaskinnum er vorðin so lágur, at tað loysir seg ikki at veiða kóp longur.

Fyri einum ári síðani fingu veiðimenninir 200 krónur fyri eitt kópaskinn, men í dag er prísurin komin niður á einar 100 krónur, og tað hevur fingið fleiri veiðimenn at gevast.

Hildið verður, at tað eru umleið sjey milliónir kópar við kanadisku eysturstrondina.

## Støðugt færri bøndur

Bøndurnir í Íslandi fækka í stórum, og í dag eru teir 26 prosent færri enn fyri tíggju árum síðani. Teir, sum hava neyt, eru 37 prosent færri enn í 2001, og seyðabøndurnir eru 22 prosent færri nú enn tá.

Men tað eru ikki bara teir bøndurnir, sum hava neyt ella seyð, sum eru vorðnir færri. Teir, sum hava svín, eru 51 prosent færri nú enn í 2001, og í sama tíðarbili eru bøndur, sum hava loðdjór, fækkaðir meiri enn 60 prosent.

Men hóast teir íslendsku bøndurnir eru munandi færri, er framleiðslan hjá landbúnaðinum vaksin, skrivar Morgunblaðið.



*Øskan úr Eyjafjallajøkli avlýsti umleið 100.000 flogferðir, og meiri enn 10 milliónir fólk noyddust at bíða ella at finna sær annan ferðarhátt*

# Íslandsøskan *var* vandamikil fyri flogfør

**Mong hildu, at loftferðslumyndugleikar og flogfeløg gjørdu alt ov nógv av, tá ein stórur partur av flogrutunum í vestara parti av Evropa vórðu avlýstar orsakað av øskuni frá gosinum við Eyjafjallajøkull í Íslandi fyri einum ári síðani. Men ein nýggj frágreiðing vísir, at avgerðin var bein**

– Í veruleikanum vistu loftferðslumyndugleikarnir ikki, hvat teir áttu at gera, men teir gjørdu tað, sum rætt var, sigur Susan Stipp, professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn og formaður í einum dansk-íslendskum granskaratoymi, sum hevur hugt at málinum.

Granskararnir á lærda háskúlanum í Keypmannahavn og lærda háskúlanum í Reykjavík hava granskað øskubitlar frá gosinum. Teir siga, at bitlatnir vóru smáir og fóru bæði høgt og langt burtur. Harafturat vóru teir hvassir og kundu oyðileggja vindeyguni á flogførunum og steðga luftkøliskipanini til motorarnar.

Donsku og íslendsku granskararnir siga, at næstu ferð eitt gos sendir øsku út um lond, fara loftferðslumyndugleikarnir at fáa munandi skjótari og betri kunning um øskuna, hvussu høgt og langt hon væntandi fer, og um hon er vandamikil fyri flogfør. Tá verður tann kunningin tøk innan eitt samdøgur, sigur Susan Stipp.

# Áland dragnar frá Finnlandi

**Samskiftið millum Áland og Finnland verður truplari, nú finnar venda sær frá tí, sum er norðurlendskt, skrivar blaðið Áland**



*Mariehamn*

Áland er í ferð við at gerast ein minni útgáva av Svøríki, og úrslitið av finska ríkisdagsvalinum fyrr í hesum mánaðinum við stórsigri til flokkin Rættir Finnar ber boð um, at sambandið millum Finnland og Áland viknar.

Tað heldur í hvussu er Niklas Lampi, sum er blaðstjóri á blaðnum Áland. Í oddagrein skrivar hann, at ávís viðurskifti so sum málið hava gjørt, at bondini millum álendingar og Svøríki hava altíð verið sterk. Nú er tað sama galdandi innan mentan og búskap, sigur hann.

Niklas Lampi vísir á, at 70 prosent av teimum álendsku umdómunum fara til Svøríkis at útbúgva seg, og at nógvar fyritøkur í Álandi við Álandsbankanum á odda eru virknar á tí svenska marknaðinum.

Í framtíðini verður tað truplari hjá álendingum at samskifta við Finnland á svenskum máli, nú finnar venda sær frá tí, sum er norðurlendskt, skrivar álendski blaðstjórin.